Tjóðskjalasavnið

# Avhending av pappírsskjølum

Almennir myndugleikar skulu avhenda pappírsskjøl teirra, tá tey eru 30 ára gomul, um onnur avtala ikki er gjørd. Hetta framgongur av grein 8 í skjalasavnslógini - **Løgtingslóg nr. 49 frá 28. apríl 1992 um skjalasøvn, sum broytt við løgtingslóg nr. 63 frá 30. apríl 2018**

Tjóðskjalasavnið leggur ætlanir fyri, nær myndugleikar og stovnar skulu avhenda pappírsskjølini. Tjóðskjalasavnið setur seg í samband við almennu myndugleikarnar og stovnarnar tá avhendingarmálið skal byrja.

Sambært skjalasavnslógini, grein 5, fevnir heitið almennur stovnur um løgting og landsstýri og stovnar teirra, kommunur og felagskommunur og kommunalar eins og felagskommunalar stovnar, stovnar við lógásettum einarætti, sjálvsognarstovnar og privatar stovnar, sum heilt ella fyri meginpartin verða riknir fyri almennan pening, ella sum røkja uppgávur vegna tað almenna.